

*- Eg vil gjarna gera fleiri slík arbeiði, men tað skal helst vera soleiðis, at tað liggur ein avbjóðing í tí, sigur Eyðun Dahl*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Gróthørð list

Grótgarðurin og -trappan líkjast einum listaverki. Hvør steinur er handtikin, og spælið í litum og skapi er margbroytt. Teknikkurin er heilt sjáldsamur, tí grótlaðarin hevur brúkt vinkulsslípara at skera kantarnar við, so garðurin er bygdur sum eitt putlispæl. Vit hava tosað við Eyðun Dal Christiansen um hansara fyrsta stóra grótverk

GRÓTLAÐING
*Ingi Rasmussen*

Møguleikarnir eru nógvir. Tú skalt bara finna teir.

Orðini eigur havnarmaðurin Eyðun Dal Christiansen, sum sipar til sítt arbeiði. Í fleiri týdningum skal tað vísa seg.

Eyðun hevur nýliga lagt síðstu hondina á eitt stórverk úr gróti hjá einum privatum húseigara í Havn.

Talan er um einar snúðtrappur og ein garð úr føroyskum gróti, sum víkur fullkomiliga frá tí, vit vanliga síggja laðað.

Kantarnir eru skornir, so laðingin líkist einum putlispæl. Flatan úteftir er náttúrlig, hvørki brotin ella sagað, og tað gevur eitt serligt spæl í grótinum, sum sjáldan sæst í slíkari samansetting.

## Handtiknir steinar

Ein grundleggjandi partur av arbeiðnum er at velja grótið. Eyðun hevur verið sjey ferðir í Porkeri og hevur gingið frá steini til stein og pilkað út.

- Hvør einasti steinur er handtikin, og eg havi gjørt mær stóran ómak at velja út. Tað er best, tá teir akkurát hava skotið í grótbrotinum. Menninir har suðuri hava verið ótrúliga hjálpsamir og hava eisini rist mær grótið út, tá eg eri komin, so tað hevur verið lagamanni hjá mær at valt burturúr, sigur Eyðun.

Tað hevur verið eitt upplivilsi í sær sjálvum at gingið fyri sjálvan í Suðuroy. Vakra náttúran gevur íblástur, og grótið í Porkeri heldur hann vera nakað heilt serligt.

- Grótið liggur í fláum, og tú sært, hvussu tað er stadnað. Tú fært næstan eina kenslu av, hvussu grótbræðingin er tornað, alt eftir hvussu veðrið hevur verið. Onkrastaðni hómast, at tað hevur verið nógvur vindur, tí bræðingin líkasum rennur eftir steininum, og aðrastaðni er tað sum bleytir ringar í einum vatni, ið er órógvað av einum lítlum fleyri. Yvirflaturnar eru so ymiskar, og tað hóskar væl til tankan aftan fyri mína laðing. Steinarnir ráða fyri ein stóran part sjálvir, hvussu endaliga úrslitið kemur at síggja út, sigur Eyðun Dal Christiansen.

Tað sæst aftur, nú trappan og garðurin standa liðug. Tað er mest álíkt einum listaverki. Litspælið er fantastiskt, og vinklarnir á steinunum eru sera ymiskir. Sum eitt slag av litfagrari kubismu. Onkur steinur er bláur og svartur, onkur annar grønbrúnur og innímillum eru teir rustreyðir. Leystliga mett eru einir 3000 steinar, og at síggja til er ikki ein eins.

## Hart arbeiði

Hvaðani áhugin fyri gróti og laðing kemur, veit Eyðun ikki at siga. Hann er sjálvlærdur og byrjaði við at laða garðin heima hjá sær sjálvum í frítíðini.

- Eg arbeiddi á Elektron, men fekk hug at royna okkurt heilt annað. Eg leyp bara útí tað, og eg havi ongantíð angrað síðan. Hvaðani tað kemur frá, veit eg ikki. Abbi mín hevði góðar hendur, so kanska tað er íborið. Tað er eisini ein spurningur um, hvat tú setir teg føran fyri, og um tú torir at bjóða tær sjálvum av, sigur Eyðun.

Hann royndi ymiskar hættir, byrjaði við meitli og fór yvir til borimaskinu men knústi leiðirnar. Onkur viðmælti honum at brúka vinkulslípara at skera við, og síðani menti tað seg so líðandi. Fyri at samansetingin ikki skal vera ov bein, slær hann kantarnar, og tað hevur eisini víst seg at geva eitt ásýnt árin, við tað at steinarnir torna ymiskt, tá tað hevur regnað.

Onkur man hava sagt onkrum, hvat hann tókst við heima við hús, tí ein dagin kom ein fyrispurningur. Og nú tað er liðugt, hevur hann arbeitt tað mesta av einum ári við hesum listarliga grótverkinum.

Eyðun Dal Christiansen hevur eisini fingist nakað við at málningar, men tað er lítið komið á lørifti, síðan hann fór at laða av álvara.

- Eg eri ofta troyttur, tá dagurin er liðugur, so ongar kreftir eru eftir til at fara undir nakað annað. Hinvegin so sleppi eg at vera kreativur nærum hvønn dag nú, og tað er eg lukkuligur fyri, sigur Eyðun.

## Óendaligir møguleikar

Tá hann arbeiddi á skrivstovuni ein góðveðursdag, bíðaði hann bara eftir, at arbeiðsdagurin varð liðugur, so hann kundi sleppa út at putlast og stressa av á tann hátt.

- Nógv sita á einari skrivstovu, tí tey noyðast fyri at fáa tað at hanga saman. Eg hevði góða løn, men treivst ikki. So fór spurningurin at troka seg á: Hvat gerst tú her? So segði eg upp, uttan eg rættiliga visti, hvat eg kastaði meg út í. Men eg trúði uppá, at okkurt fór at koma. Tað er sum við grótinum: Møguleikarnir eru óendaligir, tú skalt bara finna teir røttu, sigur Eyðun Dal Christiansen.

Hansara fyrsta stóra uppgáva er liðug. Hvat tað næsta verður, veit hann ikki. Men hann stúrir ikki fyri, at hann onki fær at gera.

- Eg vil gjarna gera fleiri slík arbeiði, men tað skal helst vera soleiðis, at tað liggur ein avbjóðing í tí. Eg vil vera við til at sniðgeva og skapa verkið saman við rátilfarinum, sum hevur so nógv at siga.



# Jól á italienskum

Jólini eru upprunaliga ein heiðran av Jesu føðing. Tað vita vit. Men í stóran mun eru jólini eisini ein staðfestan av okkara felags samleika, sum vit hava brúk fyri við jøvnum millumbilum. Við føstum ritualum minna vit hvønn annan og okkum sjálvi á, at vit sum føroyingar eru felags um nøkur grundleggjandi viðurskifti. Tí verða jól undir fremmandum himmalhválvi millum fremmand fólk og siðir ongantíð tað sama sum jól heima



*Hvør einasta av teimum fleiri túsund kirkjunum í landinum hava eina slíka jólakrubbu standandi frammi í desember mánað, og tað er ikki óvanligt; at tær hava bæði vatn- og elektrisitetveiting*

HUGLEIÐINGAR
*Rúnar Reistrup, Siena*

Jólini eru eitt tað mest konservativa fyribrigdið, sum vit hava til felags. Ung sum gomul hava somu ímynd av hvussu jólini skulu vera. Tey skulu vera júst sum seinast.

Alt skal vera júst sum tað var — sum tá vit vóru børn, og helst eisini sum tá foreldur okkara vóru børn — jú meira er tað sama, jú betur.

Vit eta tann sama matin hvørt jólaaftanskvøld, vit keypa tað sama slagið av jólatræ og brúka tað sama jólapyntið, sum gjarna skal hanga í sama stað sum í fjør. Og vit elska tað.

## Dunnuluktur

Og meðan tað fyri útleingjandi føroyskar sálir kann vera herligt at vera burtur úr Føroyum í dagar og ár, so seta jólini hvørt ár gongd á eina landaflýggjan úr útlondum til Føroya. Bara tankin um at sita og kúra á einum kollegiekamari jólaaftan, meðan gásin ella dunnan har heima sendir sín heita anga út úr ovninum og inn í nasarnar á jólahýrsmerktu familjuni, fær sjálvt tann mest harðføra studentin at leingjast heim tá tað líður inn í desember mánað, og barnafamiljur uttanlands vilja ofta hava børnini at halda jól, júst sum tey sjálvi hildu jól — í Føroyum.

Heimkomur hjá útisetum, og heimlongslulsmerktu jólaheilsanirnar frá teimum, sum ikki venda heim hesuferð, men lova, at tey koma ein túr í summar, eru soleiðis vorðnar ein partur av føroyskari jólamentan.

## Ikki fitt

Sjálvur havi eg nú í nøkur ár havt ta afturvendandi gleði at verið partur av skaranum, sum við eini imponerandi luftbrúgv millum Føroyar og Danmark verða flutt 1500 kilometrar norðureftir av Atlantic og Maersk í døgunum undan jólum.

Men í ár verður øðrvísi. Havi sett mær fyri ikki at vera so góður við meg sjálvan í ár. Skal ístaðin halda jól, ella rættari, eitt slag av jólum undir italienskum himmalhválvi. Tí verulig jól kann tað jú ongantíð verða talan um, tí tey verða jú ikki akkurát sum tey plaga, og tað skulu tey fyri at vera eini verulig jól. Men jólini eru ikki til at umganga, og 24. desember skulu tey nokk fanga meg, hvar eg so eri.

So fyri at fyrireika meg eitt sindur uppá hvat treytaleyst er í væntu, havi eg sett meg eitt sindur inn í hvussu jól í Italia fara fram.

## Eingin jólafrokostur

Tað fyrsta, sum italiensku jólini vanta samanborið við føroysku jólini eru jólafrokostarnir undan jólum. Hesin hugnaligi og ofta ikki sørt stuttligi siður, ið danir hava ment, og sum føroyingar adopterað við húð og hár og donskum livurpostei, verður ikki brúktur her. Og hevði ein jólafrokostur verið fyriskipaður í Italia, hevði hann helst verið nakað turrisligur eftir føroyskum mátistokki, tí flestu italienarum dámar einki at drekka sær eina kenning.

## 24. uttan hóvasták

Jólaaftan í Italia er lítið meira enn ein vanligur desemberdagur. Handlar hava opið sum vanligt til klokkan átta ella níggju, og fólk eru til arbeiðis. Í summum familjum er traditión fyri einum góðum døgurða um kvøldið, men júst hvat verður sett á borðið er ikki so siðbundið.

Italiensku jólini byrja soleiðis ikki jólaaftan sum føroysk jól. Tey byrja harafturímóti beint eftir. Tá kirkjuklokkurnar ljóða á miðnátt og boða frá at jóladagur byrjar, eru kirkjurnar fullar, og tær katólsku miðnáttarmessurnar byrja í øllum kirkjum í landinum.

Hóast pávasætið er mitt í høvuðsstaðnum, og landið hevur sterkar katólskar traditiónir, hava italienarar sum heild ein rættiliga avslappaðan hugburð til sína religon og eru ikki kendir sum so trúgvir kirkjugangarar. Men á miðnátt 24. desember fer alt, sum kann flyta seg, í kirkju.

Havi onkuntíð roynt at fylgt við miðnáttarmessuni úr Pæturskirkjuni úr Rom, sum Sjónvarp Føroya trúliga serverar hvørt jólaaftan, og havi altíð hildið hana verið eins spennandi og veðurtíðindini ein føroyskan januardag. Men "skik følge eller land fly" plaga danir og føroyingar at taka til, og nú eg havi valt ikki at flýggja um jólini, má eg heldur gera tað fyrra og møta upp til miðnáttarmessuna í dómkirkjuni í Siena.

## Gávur, heks og kol

At geva hvørjum øðrum jólagávur á jólum er eins og nógva aðrastaðni rættiliga nýtt í Italia. Gamal italienskur siður er, at náttina til trettanda kom ein heks og fylti hosurnar hjá børnunum, og hetta vóru einastu jólagávur, sum børn fingu. Høvdu børnini skikkað sær væl, fingu tey góðgæti, men høvdu tey skikkað sær minni væl, fylti heksin hosurnar við kolstykkjum. Í nútímans útgávuni av hesum siði koyrir heksin góðgæti, ið líkist kolstykkjum, niður í hosurnar trettanda.

Men hvat eru eini modernað jól uttan stóra árliga jólagávuskiftið og jóladøgurðan? Í Italia fer hetta fram jólamorgun. Tað fyrsta børnini gera, tá tey vakna, er at lata allar jólagávurnar upp, og um miðdagsleitið fara øll til jólaborðs, har borðreitt verður við størsta døgurðanum á árinum, sum sambært italienskum matsiði er samansettur av einum ótali av ymiskum verðum.

## Krubbur

At jólini upprunaliga snúgva seg um at minnast Jesu føðing og ikki bara um jólamenn, jólamat, gávur og jólatrø, verður ikki gloymt herniðri. Ikki tí, jólatrø verða eisini seld til flest øll italiensk húsarhald, men jólatræið fær ikki fremsta pláss í heiminum. Tað fáa harafturímóti pallmyndir av føðing Jesusar, sum einki italienskt húsarhald kann vera fyri uttan í jólamánaðinum.

Tað er ein elligamal italienskur jólasiður at byggja landsløg við fjósi, krubbu, Jesusbarni, Mariu, Jósef og øllum hinum, sum hoyrir til eina mynd av tí, sum hendi jólanátt fyri 2002 árum síðan.

Hvør einasta av teimum fleiri túsund kirkjunum í landinum hava eisini eina slíka jólakrubbu standandi frammi í desember mánað, og tað er ikki óvanligt; at tær hava bæði vatn- og elektrisitetveiting, soleiðis at lív kann koma í ljós, brunnar og alt møguligt annað í jólakrubb-unum, sum kunnu vera rættiliga umfatandi og tøkniliga framkomnar.

Jólakrubburnar til heimabrúk kunnu keypast heimagjørdar á marknaðum og serhandlum ella hópframleiddar í handilskjarnum, og eisini hesar hava í besta føri allar møguligar tøkniligar hentleikar.

So eina slíka má eg heldur minnast til at keypa mær, nú jólini nærkast í hvørjum, hóast allarbest mær hugnar í Føroyum.